# FEÐGAR VIÐ KAFKA



**SJÓNLEIKUR** Feðgarnir Búi og Egi Dam hava seinastu tíðina fyrireikað uppsetingina av leikinum "Apan" eftir Frants Kafka. Fríggjakvøldið verður premiera á Tjóðpallinum

Rigmor Dam

Herfyri høvdu vit Berhold Brecht á Maiarínum. Nú um dagarnar uppliva vit Lagerkvist í Norðurlandahúsinum. Og í komandi viku kemur sjálvur Kafka á vitjan í Føroyum.

Jú, hjá teimum, sum líkar europeisku meistararnar, er hugaligt at vera teaturfjeppari.

## Feðgar á ferð

Sum sagt verður Kafka næstur á plakatuni. Hetta er við víðagitnu søguni "Apan". Tað er Gríma, við feðgunum Ega og Búa Dam, sum setir leikin upp, og hava teir premieru nú fríggjadagin 27. august kl. 20 á Tjóðpalli Føroya.

Leikurin er ein einmansleikur, har Egi Dam spælir apuna, meðan sonur hansara Búi hevur leikstjórnað. .

## Apan verður fólk

"Apan" byggir á stuttsøguna hjá Kafka "Ein Bericht fur eine Akademie". Í stuttum snýr hon seg um apuna, Reyði Pætur, sum verður biðin um at halda fyrilestur fyri "æraðu limunum í Akademinum". Fyrilesturin skal umrøða broytingina frá tilveruni sum apa, til í dag, har apan er vorðin ein mentaður europeiskur maður.

Apan varð skotin og settur í búr við Gullstrondina í Afrika. Hagani varð hon førd við skipi til Europa.

Einasti møguleikin fyri at vinna frælsið er at herma eftir mennikjunum, og skjótt dugir hon bæði at spýta og at drekka romm saman við manninginí umborð. Eisini lærir hon at tosa sum teir.

Reyði Pætur kann síðani velja millum eina ófrælsa tilveru í djóragarðinum ella eitt lív við varitéina. Hann velur tað seinna og setir sær fyri at gerast menniskja.

## Tann, sum er uttanfyri

Eitt tema, sum ofta gongur aftur í skaldskapinum hjá Franz Kafka er menniskjan, sum roynir alt tað hon er ment at laga seg til galdandi normar í samfelagnum. Men kortini hevur hon altíð kensluna av ikki at strekkja til, at vera uttan fyri - fremmand.

Hetta er eisini temaið í leikinum "Apan", lýst gjøgnum apuna, sum verður ein væleydnað menniskja - í hvussu er at síggja til.

rigmor@sosialurin.fo



## Kafka

Franz Kafka varð borin í heim í Prag í 1883 og doyði 1924, bert 40 ára gamal.
Hann er ein hin háttvirdasti og best umtókti høvundin í nýggjari tíð. Best kendu verk hansara eru skaldsøgurnar Prosessin, Slottið og Amerika, og av stuttsøgum kunnu nevnast Dómurin og Broytingin.

## Nær og hvar?

Fyrsta framførslan av Apuni verður á Tjóðpalli Føroya fríggjakvøldið 27. aug. kl. 20. Síðan verður spælt hvørt kvøld kl. 20 til 6. september. Atgongumerki fáast á ebillett.fo og á Kunningarstovuni.